

ENDURLÝSING:

**Vinnuháskúlin søkir *húsavørð* at byrja 1. januar 2008.**

**Um starvið**
Sum húsavørður á Vinnuháskúlanum hevur tú ábyrgd av øllum vanligum húsavarðararbeiði í bygningum skúlans, viðlíkahald og umvæling av teknisku útgerð skúlans, at stuðla á laboratoriunum, tá tað er neyðugt, við t.d. við at gera uppstillingar.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir maskinmeistara, handverkara, elektrikara, ella fólki við líknandi førleikum.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og fíggjarmálaráðið.

**Umsókn skal sendast til:**
Vinnuháskúlan
Att. Hans Johannes á Brúgv, stjóri
Postboks 104
FO-110 Tórshavn.

**Freistin**
Umsóknarfreistin er mánadagin 3. desember 2007.

Nærri fæst at vita við at ringja á tel 350 250, ella tel 212549.

Vinnuháskúlin hevur fýra útbúgvingar: Skipara, skipsførara, maskinist og maskinmeistara. Skúlin lýkur STCW krøv, og tí eru útbúgvingarnar á altjóða støði og geva arbeiðspláss kring allan heim. Á starvsstovunum finst øll standard nútímans útgerð. Í dag ganga 160 næmingar á skúlanum.

KREA

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · www.vh.fo


# Ein yngri Svensson í Smiðjuni





*Ein av málningunum hjá Áslur Ranvu Svensson*

*28 ára gamla Ásla Ranvá Svensson sýnir fram í Smiðjuni frá fríggjadag til sunnudagur*

LISTAFRAMSÝNING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Pápa hennara, Kára Svensson, kenna øll sum ein fremstu listarmonnum í landinum. Dóttirin, Ásla Ranvá Svensson, hevur eisini havt framsýningar bæði í Havn, Klaksvík og Fuglafirði. Eisini hevur hon luttikið á framsýningum saman við pápa sínum og einum ungum listarmanni, sum kallast John Martin Christiansen, ið gongur á listaskúla í Holbæk. Haraftur at hevur Ásla Ranvá Svensson luttikið á bæði vár- og ólavsøkuframsýning. Hon málar abstrakt, har náttúran og serliga havið er gjøgnumgangandi í flestu motivum. Framsýningin í Smiðjuni hevur heitið »Okkurt staðٜ«. Ásla Ranvá Svensson er 28 ára gomul og hevur málað regluliga seinastu átta árini. Fríggjadagin hevur Ásla Ranvá Svensson fernisering í Smiðjuni í Lítluvík frá klokkan 16 til 19. Leygardagin er opið frá 15 til 18 og sunnudagin, sum er seinasti dagurin at síggja málningarnar hjá Áslu Ranvu Svensson á hesum sinni, er opið frá 16 til 19.


www.havsbrun.fo



Er tín stórsta styrki

“Vanligt vit og skil…”

– so er tað kanska tær vit hava brúk fyri…

Havsbrún er eitt av stórstu og tøkniliga mest framkomnu framleiðsluvirkjunum í Føroyum við 90 starvsfólkum og einum umsetningi uppá smáar 600 mill. kr árliga. Havsbrún framleiðir fiskamjøl- og lýsi á Mjøldeildini, og alifóður á Fóðurdeildini.

Vit koma í nærmastu framtíð at hava brúk fyri framleiðslufólki, og vilja hervið eggja áhugaum at søkja.

**Arbeiðsuppgávur**
- Tá ið framleiðsla er at verða partur av dagliga arbeiðinum sum er í vaktum við skiftandi tíðum.
- Røkt, viðlíkahald og umvælingar av framleiðslustólum og virkinum annars.

**Vit rokna við at tú hevur**
- ein ávísan kunnleika til maskinur og teldur
- eldhuga, ert álítandi og ágrýtin

Lønina tosa vit um…

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum tekniskt dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

Hevur hettar tín áhuga, so send eina umsókn so skjótt sum gjørligt. Tó seinast 30. novembur 2007. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Vilt tú vita meiri, ert tú vælkomin at ringja til Hartvig Joensen, deildarleiðara ella senda ein teldupost.

HAVSBRÚN

pf Havsbrún
FO-530 Fuglafjørður
Tlf 41 44 00
Fax 41 44 01
E-mail: haj@havsbrun.fo

